## Nýtt dagtilhald letur upp í dag

**Strendur:** Eins og so manga aðrastaðni fáa strandingar nú eisini høvið til at hitta hvønn annan í einum dagtilhaldi.

Sjóvar kommuna hevur nevniliga leigað sonevndu Pensjónistahúsini til hetta tiltakið tveir dagar um vikuna. Endamálið við dagtilhaldinum er at fólk skulu kunnu koma saman at hugna sær og gera ymiskt saman, soleiðis at tey kunnu mennast og fáa økt lívsvirði.

Fyrstu ferð hetta dagtilhald lat upp dyr sínar var seinnapartin í dag, tá ætlanin var at gera okkurt serligt burturúr úr fyri øllum teimum, sum koma at brúka hetta tilboðið.

Leiðarin fyri dagtilhaldið, Karen Abrahamsen sigur at ætlanin er at hetta dagtilhaldið skal verða opið tveir dagar um vikuna, týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18.

Millum gestirnar í dag vóru m. a. Jógvan Fríðriksson prestur og fleiri næmingar úr musikkskúlanum, sum gjørdu hesa løtuna so hugnaliga.

**sb.**

## Stór ungdómsstevna í mai mánað

**Giljanes:** Er tað nakað sum nógv ung gleða seg til, so man tað vera at sleppa á ungdómsstevnuna, sum tey ungu innan Heimamissiónina skipa fyri annaðhvørt ár.

Fyrireikingarnar til ársins Landsungdómsstevnu eru langt síðani farnar í gongd, og herfyri varð eisini gjørt kunnugt, at stevnan verður í skúlanum á Giljanesi í døgunum 11. til 14. mai.

Tá stevnan seinast varð hildin í Havn fyri tveimum árum síðani vóru meiri enn 300 ungdómar úr øllum landinum við.

Vanliga er talan um eina spennandi og fjølbroytta skrá, sum hevur nakað bæði fyri tey heilt ungu og tey eitt sindur eldri ungu.

**sb.**

## Lata tilboðini upp í næstum



*Arbeiðið á Oyrareingjum bíðar nú bert eftir brúnni um Dalánna*

*Mynd: Landsverk*

**Oyrareingir:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við at breiðka innkoyringarvegin hjá íbúgvunum á Signabø og Oyrareingjum.

Tann stóri bitin í hesum hevur verið at gera brúnna um Dalánna av nýggjum. Vegagerðin sjálv er liðug, men brúgvin skal samsvarandi gerast soleiðis, at hon hóskar til ferðsluna í dag.

Arbeiðið við at gera brúnna lidna og verða samráðingar við tilboðsgevaran í næstum, upplýsir Landsverk á heimasíðu sínari.

Arbeiðið fer at kosta um 8 mió. kr., og verður ætlandi liðugt á sumri næsta ár.

**sb.**

# – Skal ein kappast so má ein satsa



*Synnøva Waag Poulsen málaði seinnapartin í gjár eitt hillasystem, meðan Katrin Sigurðsson málar hillar í handlinum Amaranth. Alt skal verða klárt til í dag, tá vørurnar skulu setast á hillarnar*

**Handilslívið í Klaksvík er farið at fyrireika seg til undirsjóvarunnilin. Hósmorgunin letur upp ein nýggjur handil sum burturav fer at selja gávulutir**

HANDIL

*Orð/mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** - Her sær ikki gott út í býnum ídag! Man ein hópur av handlunum í býnum hava pakkað saman?!

Í fleiri av handlunum í Klaksvík ber ikki til at síggja innar, tí pappír er sett fyri framsýningarvindeyguni. Á hurðini boðar ein lepi eisini frá, at handilin er afturlatin - men bert fyribils!

Fleiri av handlunum hava nevniliga sett sær fyri at gera seg út til hin 29. apríl, tá koyrandi verður á fyrsta sinni millum Klaksvík og Leirvík.

Ein av hesum handlum er nýggi handilin Amaranth, sum letur dyrnar upp á fyrsta sinni hósmorgunin við einum stórum úrvali av gávulutum.

– Vit vænta, at nógv fólk fara at koma hendavegin, tá Norðoyatunnilin letur upp.

– Og fyri okkum skuldi tað helst verðið so, at fólk koma inn í okkara handil - ikki bara einaferð, men aftur og aftur, sigur Synnøva Waag Poulsen, sum eigur henda handilin.

### Spennandi og hugnaligt

Synnøva hevur frammanundan arbeitt við myndatøku og sølu av útgerð, ið krevst til tað.

Seinni komu so gávulutirnir aftrat í handilin. Men tá dyrnar verða lætnar upp hósmorgunin kl. 10, verða bert gávulutir at fáa í handlinum, sum samstundis hevur fingið sær hetta nýggja navnið.

Fyri Synnøvu er eingin ivi um, at skal ein verða við í kappingini um kundarnar tá Norðoyatunnilin letur upp, so er neyðugt at gera seg út til tað.

– Ja, ein er snøgt sagt noyddur at satsa eitt sindur.

– Eg ætli mær tí at gera handilin bæði innbjóðandi og hugnaligan. Handilin skal verða spennandi hjá kundanum at koma inn í, sigur hon við einum brosi.

Hon miðar eisini eftir at gera handilin eitt sindur forkunnugan, og fer tí at bjóða kundunum gávulutir við merkjum, sum tey helst ikki fáa allastaðni.

Millum hesi sermerktu merkini eru Lene Bjerre og Au Maison, eins og Rikke Jakobsen. Serstøk merki av útlendskum the verða somuleiðis at fáa.

### Hugskot

Tá vit vitjaðu handilin stutt eftir middag í gjár vóru Synnøva og hjálpari hennara, Katrin í ferð við at mála innan. Hon hevur eisini fingið Linda Laksáfoss at hjálpa sær við dekoreringini av hølunum.

Tær arbeiddu tá við at gera alt klárt til vøruna, sum kom til landið við Norrønu ígjár. Í dag og í morgin er so ætlanin at pakka alt hetta út.

Vørur og hugskot til innrætting og tílíkt hevur Synnøva fingið eftir ferð í Danmark í farna mánaði.

Tá var hon á stórari messu, men nýtti eisini høvið at vitja gávuhandlar av líknandi slagi, sum klaksvíkingar og norðoyingar fyrst, og síðani allar Føroyar, fáa høvið at vitja hósdagin.

– Eg eri øgiliga spent. Jú, eg gleði meg, sigur Synnøva.

# Nýggja missiónshúsið vígast sunnudagin

**Seinastu sjey árini hevur missiónsfólkið á Skála sæð fram til henda dagin, tá nýggja missiónshúsið skuldi verða vígt alt sum tað var**

SAMKOMA

*Snorri Brend*
*sorri@sosialurin.fo*

**Skála:** Í 1999 byrjaði arbeiðið við tí nýggja húsinum, og tvey ár seinni varð 1. byggistigið liðugt og tikið í nýtslu.

Síðani tá hava møtini verið hildin í kjallaranum, men sunnudagin verður alt húsið sum tað er vígt og tikið í nýtslu.

Í møtisalinum verður pláss fyri eini 200 fólkum. Har eru eisini góðar tøkniligar umstøður og øll ljóðútgerð, sum krevst til eitt slíkt hús í dag.

Hóast húsið bæði er stórt og snotuligt, so er støðan hon í dag, at tey skylda ongum nakað.

### Eingin skuld

Formaðurin í missiónshúsinum, Sylverius Jacobsen sigur við Trúboðan, málgagnið hjá Heimamissiónini, at teimum hevur ongantíð manglað pengar.

Tey hava heldur ongantíð tikið nakað lán.

– Vit hava kunnað um støðuna, og so eru pengar komnir inn. Vit skylda einki í dag, og nú stendur húsið í 2,5 milliónum krónum. Tá er arbeiðslønin ikki tikin við.

– Tá ið alt er liðugt koma vit at mangla undir 100.000 krónur. Men vit vænta eisini at fáa teir pengarnar inn, sigur Sylverius við blaðið.

Hátíðarhaldið byrjar sunnudagin kl. 18. Næsta stóra tiltakið í hesum nýggja missiónshúsinum verður páskastevnan í næsta mánaði.